Kommunalar ferðavinnuætlanir

Endamálið við ferðavinnuætlanunum er at styrkja lokala sjálvræði í ferðavinnuni. Løgtingslógin um burðardygga ferðavinnu leggur upp til, at økini sjálvi og kommunan sum myndugleiki seta treytirnar fyri, hvussu ferðavinnan í økinum skal virka innan lógarásettu karmarnar. Tað eru kommunurnar, ið gera av, hvussu ferðavinnuvirksemið í økjunum skal skipast og hvørjar avmarkingar, kommunan metir skulu til fyri at verja náttúru, mentan og trivnað, eins og hvørjar íløgur eru neyðugar fyri at betra um fortreytirnar fyri at fáa ágóða av ferðavinnuni í økjunum.

Allar avmarkingar, ið verða gjørdar fyri at verja náttúru og/ella mentanararv. skulu tó sambært lógini góðkennast av avvarðandi myndugleikum.

Leisturin fyri kommunalu ferðavinnuætlanirnar

Leisturin fyri kommunalu ferðavinnuætlanirnar er gjørdur eftir hesum metingarkrøvum:

1) Leisturin skal sum minsta mark leggja upp til, at kravið í lógini verður rokkið.
2) Ætlanirnar skulu vera so einfaldar og ítøkiligar sum til ber.
3) Kommunurnar gera sjálvar av, hvussu nógv verður gjørt burturúr ætlanini, og hvussu tilgongdin verður løgd til rættis fyri at tryggja gott lokalt kjølfesti.

Kommunala ferðavinnuætlanin verður gjørd við at fylla út talgilda oyðublaðið á heimasíðuni hjá Uttanríkis- og Vinnumálaráðnum; oyðublaðið skal sendast inn áðrenn árslok 2025.

Allar ferðavinnuætlanirnar skulu góðkennast av landsstýriskvinnuni. Tá ein kommuna hevur fylt út oyðublaðið, hevur kommunan sent landsstýrinum sítt uppskot til ferðavinnuætlan. Uppskotið verður síðani viðgjørt, og kommunan fær boð, tá uppskotið er viðgjørt. Er uppskotið góðkent, verður tað lagt út á heimasíðuna hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum. Verður uppskotið verður góðkent, verður greitt frá, hví ætlanin ikki kann góðkennast og hvat kommunan kann gera fyri at lúka treytirnar fyri at fáa uppskotið góðkent.

Kommunurnar skulu sambært lógini standa fyri eini tilgongd, ið tryggjar, at viðkomandi partar í økinum verða hoyrdir, áðrenn endalig ferðavinnuætlan verður send til góðkenningar. Kommunurnar avgera sjálvar, við støði í staðbundna tørvinum, hvussu endamálið í § 6 um luttøku verður rokkið, eitt nú við almennum fundum o.tíl.

Hvat skal ferðavinnuætlanin innihalda

Lógin um burðardygga ferðavinnu ásetur í § 6, at allar kommunur, saman við viðkomandi pørtum í økinum, skulu gera eina ferðavinnuætlan, har ferðavinnuvirksemið í kommununi verður greinað og fyriskipað soleiðis, at tað í minst møguligan mun ger seg inn á náttúru, djóralív, heimafólk, mentan og mentanararv.

Ferðavinnuætlanin skal røkka út á kommunumark, men kommunur kunnu samstarva um at gera ferðavinnuætlanir fyri natúrligt avmarkað øki, t.d. eina oyggj.

Kommunurnar *skulu* sambært lógini annars*:*

- Merkja upp *nýggjar* farleiðir í samráð við bóndan og avvarðandi myndugleikar (sí § 7 í løgtingslógini og viðmerkingarnar til ásetingina). Tað er tó ikki eitt krav, at nýggjar farleiðir skulu gerast, har góðir møguleikar longu eru at ganga uttangarðs til áhugaverdar náttúruupplivingar; málið er, at gongufólk altíð hava góðar leiðir at fara.
- skipa gongdina í økjum við nógvum ferðafólkum við skilhaldsreglum (í samráð við bónda og heimafólk). Landsstýrið skal góðkenna hesar skilhaldsreglur og lýsa tær í kunngerð. (sí § 8 í løgtingslógini)

Tað er kommunan, sum sambært lógini skal uppmerkja nýggjar leiðir. Vísir tað seg við tíðini, at tørvur er á at tillaga uppmerktar leiðir, t.d. tí leiðin órógvar djóralív ella annað, ber til hjá kommununi við sakligum grundgevingum at leggja leiðir um ella velja aðrar gonguleiðir í økinum.

Eisini *kann* kommunan:
Sbrt. § 10 áseta reglur um ferðaleiðara ella stongsil í økjum, har tað er serliga vandamikið at ferðast. Tað skal gerast í samráð við bóndan, og eisini skal serkøn meting verða gjørd. Ikki fyrr enn hendan meting er fingin til vegar, ber til at áseta krav um ferðaleiðara. Kravið um ferðaleiðara skal vera partur av skilhaldsreglunum, sum sbrt. lógini skulu lýsast í kunngerð.

Ferðavinnuætlanirnar skulu sostatt sum minstamark
1) eyðmerkja nýggjar farleiðir og
2) gera skilhaldsreglur í økjum, har nógv fólk ferðast.

Talgilda oyðublaðið tekur støði í lógarásettu krøvunum og biðið verður ikki um aðrar upplýsingar enn tær, sum lógin beinleiðis tilskilar. Av tí at ferðavinnan ikki er skipað eftir kommunumørkum, kann tað vera skilagott hjá kommunum at samstarva um ferðavinnuætlanirnar og fylla út oyðublaðið í felag.

Av tí at kommunurnar eru so ymiskar í vavi og støddd, kann tað vera neyðugt hjá fleiri kommunum at senda inn fleiri ferðavinnuætlanir, ið nágreina, hvørjar gonguleiðir og hvørjar skilhaldsreglur skulu galda fyri ymisk øki í kommununi. Til dømis kann Tórshavnar Kommunu senda inn sjey ymiskar ferðavinnuætlanir, t.e. fyri Havnina, Nólsoy, Hest, Koltur, Kirkjubø, Kollafjørð og Kaldbak.

Fleiri kommunur hava orðað egnan ferðavinnupolitikk, sum kann snúgva seg um hentleikar, raðfestingar og átøk, ið bæði kunnu skipa og menna ferðavinnuna í økinum. Tað er skilagott hjá kommunum at orða slíkan politikk. Tað er tó ikki partur av lógarkravdu kommunalu ferðavinnuætlanini.

Ferðavinnuvirksemið í kommununi
Kommunurnar skulu sbrt. § 6, stk. 1 greina ferðavinnuvirksemið í kommununi og greiða frá, hvussu virksemið verður fyriskipað, so tað verður so burðardygt sum gjørligt.

Endamálið við at greina ferðavinnuvirksemið er at skapa yvirlit yvir tey serligu viðurskiftini í kommununi, ið gera tað neyðugt at skipa ferðavinnuna, t.d. við serligum skilhaldsreglum. Í oyðublaðnum verða kommunurnar tí bidnar um at greiða frá hesum. Gev tó gætur, at skilhaldsreglurnar skulu lýsast í serligari kunngerð og krevja serstaka viðgerð í hvørjum einstøkum føri.

Endamálið við at greiða frá skilhaldsreglum í kommunalu ferðavinnuætlanini er at tryggja, at hesar reglur taka støði í tí tørvi, sum er staðfestur í samband við. at kommunalu ferðavinnuætlanirnar verða viðgjørdar saman við heimafólki, hagastýrum o.ø. Eftir at kommunala ferðavinnuætlanin er góðkend, áliggur tað kommununi at taka næsta stig og fáa til vegar góðkenning frá landsstýriskvinnuni, sum kann lýsa skilhaldsreglurnar í kunngerð.

Dømi um kommunalan ferðavinnupolitikk

Sum ein íblástur hjá kommununum er eitt hugsað dømi um ein kommunalan ferðavinnupolitikk gjørt. Støði er tikið í Nólsoynni sum ein sjálvstøðug kommuna. Gev gætur, at talan er um eitt hugsað dømi, ið ikki hevur verið til viðgerðar hjá Tórshavnar Kommunu ella hjá heimafólki og festarum í Nólsoy. Hetta er einans ætlað sum íblástur, so kommunurnar fáa eina mynd av, hvussu ymisku teigarnir í oyðublaðnum kunnu fyllast út.

Kommuna
Nólsoyar Kommuna

Kontaktpersónur í kommununi
Nólsoyar Páll

Telefon
123456

Teldupostur
Nolsoy@nolsoy.fo

Tilgongdin at gera ferðavinnuætlanina
Nólsoyar Kommuna orðaði í 2020 eina ferðavinnuætlanina fyri oynna. Ætlanin byggir á samrøður við fólk í Nólsoy og greiðir frá ferðavinnumøguleikum og neyðugum tiltøkum í oynni fyri at røkka málinum um eina burðardygga og væl skipaða ferðavinnu.

Sum liður í arbeiðinum at gera hesa ætlanina hevur Nólsoyar Kommuna havt almennan borgarafund, har øll áhuga er sloppin til orðanna. Eisini hevur kommunan havt serstakar fundir við hagastýrini í kommununi. Endamálið við hesum fundum hevur fyrst og fremst verið at finna fram til, hvørjar gonguleiðir eru hóskandi at vísa á/uppmerkja, men eisini um ynsktu skilhaldsreglurnar, tá gingið verður í haganum í Nólsoy.

Farleiðir í dag

Umframt bygdagøtuna út á Borðuna, er upplagt at vísa á leiðina út á Stongina og norður á Boðan, ið er atkomilig eftir traðarvegum tað mesta av leiðini.

- Tað er bara almenna bygdagøtan út á Borðuna sum er merkt upp við skeltum og prestum.
- Leiðirnar Norður um bygdina (t.e. út á Stongina v.m.) eiga at verða uppmerktar og skeltaðar.

Tørvur er á fleiri gonguleiðum í Nólsoyi, soleiðis at gongufólk hava eitt meiri fjølbroytt úrval av gongutúrum. Túrurin út á Borðuna er langur og av tí sama óhóskandi fyri mong. Fleiri leiðir kunnu skapa eitt størri úrval við fjølbroytni og eisini taka ein part av trýstinum av gøtuni út á Borðuna, ið er nógv brúkt og slitin á støðum.

Nýggjar farleiðir uttangarðs

Nólsoyar Kommuna ynskir at uppmerkja 3 nýggjar leiðir í oynni:

1) Langa leiðin fyri tey royndu, ið verður ein rundferð út á Borðuna og heimaftur eftir røðini eystarumegin á oynni;

2) Niðan á oyggj – leiðin upp á hægsta punkt í oynni og

3) Norð á Boðan (lætti túrurin)

Tørvur er á uppmerkja allar tær nýggju leiðirnar við skeltum og steyrum.

Kort við gøtum og farleiðum

Nýggjar gøtur sum kommunan ætlar at gera við loyvi frá nattúrufyrsitingini

Bygdagøtan út á Borðuna er uppmerkt og umvæld í fleiri umførum sum partur av Closed For Maintenance. Framvegis eru partar av hesi farleið, serliga frá bygdini og niðan á Oyggjamúla, har tað er neyðugt at gera eina gøtu, sum heldur. Hetta hevur kommunan í hyggju at fara undir við loyvi frá Náttúrufyrisitingini

Kort við nýggjum gøtum sum skulu gerast

Skilhaldsreglur

Nólsoy er Ramsar-oyggj, og tað er serliga økið við stóra drunnhvítabýlið, ið er neyðugt at verja. Ynskiligt var at serlig økisverndarkunngerð við heimild í náttúruverndarlógini varð gjørd fyri hetta serstaka økið.

Talan er serliga um økið kring Nýggjurð eystarumegin (sí kort).

Skilhaldsreglurnar hava til endamáls at verja serstaka fuglalívið og serstøku náttúruna eystarumegin á á Nólsoynni. Neyðugt er tí at avmarka atgongdina hjá almenninginum til hetta økið, ið einans verður atkomiligt við staðkendum ferðaleiðara. Hetta verður gjørt greitt við týðiligari skelting og við einum útsýnisstaði, har ferðafólk kunnu hyggja at økinum og fuglinum við hóskandi frástøðu.

Aðrar skilhaldsreglur: Kommunan fer í samráð við jarðareigararnar í økinum at finna eina hóskandi skipan sum tryggjar, at neyðuga kunningin um rættan atburð, tá gingið verður í haganum, kemur út til tey, ið vitja oynna. Ávísar avmarkingar verða settar 1. november – 31. desember, tá harutíðin er; skilhaldsreglur og kunning um atburð verða settar upp í lembingartíðini eins og kunning um gongd í slignum bøi verða gjørdar, har tað er neyðugt. Kommunan metir sum nú er, at tað er ikki neyðugt at skipa hetta í kunngerð.

Hvar er ætlanin at skilhaldsreglurnar verða galdandi

Sí kort (drunnhvítaøkið)